Mentanarhúsið í Fuglafirði:

# Skeið í máling seyming og tøving



**Í døgunum 21. 22. og 23. juli 2006 verður Mentanarhúsið í Fuglafirði aftur karmur um eitt skeið í máling, seyming og tøving. Fyrra skeiði var í miðskeiðis í juni mánað**

Tíðindaskriv

Eitt skeið í máling, seyming og tøving var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í døgunum 16., 17. og 18. juni í ár. Skeiðið byrjaði fríggjakvøld og longu áðrenn tað fyrsta kvøldið var runnið, var íblásturin hjá luttakararunum so stórur, at teir vildu ikki leggja amboðini fyri at hvíla til ein langan leygardag fyri framman.

Árla leygarmorgunin var Mentanarhúsið aftur fult av kreativum fólki, ið bara vildu skapa mera. Allan leygardagin á tamb varð framleitt av lívsins kreftum, og tað leið væl út á sunnumorgunin áðrenn amboðini hvíldu aftur.

Sunnudagurin varð so endabresturin, har sýnast skuldi fram. Men luttakararnir høvdu skapað so nógv og høvdu so ilt við at steðga, at framsýningin bleiv meira eitt verkstað, har tey vitjandi høvdu høvi at hyggja at meðan listafólkini løgdu seinastu hond á verkini.

Sum tann fullfíggjaði endin á tiltakinum skein sólin bæði oman og niðan í Fuglafirði sunnudagin 18. juni, so framsýningin av verkunum frá skeiðnum varð flutt útum á tað stásiliga torgið uttanfyri Mentanarhúsið.

Nógv fólk vitjaði framsýningina og áhugin var stórur at fáa fyriskiparar nar at skipa fyri einum skeiði afturat. Hetta verður nú veruleiki, og verður Mentanarhúsið í Fuglafirði, ið er sera væl egnað til tílíkt tiltak, aftur karmur um skeið í máling, seyming og tøving í døgunum 21., 22. og 23. juli 2006.

Tað eru tær tríggjar kreativu eldsálirnar Randi M. Gunnarsdóttir, Oddvør á Lakjuni og Unn E. Petersen, ið skipa fyri. Til ber at ringja til eina teirra og fáa meira at vita ella at tegna seg á tlf. 224253

## Dagurin í morgin

**7. juli.** Villebaldus, deyður í 787. Saman við pápa sínum Rikardi og bróðurinum Vunibaldus gjørdi hesin enski munkurin pílagrímsferð til Róm og var tann einasti, ið kom fram. Seinni gjørdist hann biskupur í Eichstadt í Bayern.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Edmund Haraldsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum í kapellinum á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til prest fyri troystarrík orð.
Tøkk til sangarar og kirkjutænarar, berarar og gravara.
Tøkk fyri uppringingar, blómur og kransar, peningagávur og til øll, ið hjálptu á annan hátt.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Harrin signi tykkum øll.

**Marita, børn og abbabørn**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Højsted,** ættað úr Hvalvík, búsitandi í Taastrup andaðist á Plejecentret Henriksdal í Taastrup fríggjadagin 30. juni, 82 ára gomul. Jarðarferðin úr Hvalvíkar kirkju verður lýst seinni.

**Jonna Rasmussen,** fødd Nielsen, ættað úr Havn, búsitandi í Sørvági, andaðist mikudagin 5. juli, 65 ára gomul. Andakt verður á Ellisheiminum í Vágum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jonnu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu. Konto í peningagastovnunum.

**Petur Petersen,** Tvøroyri vanliga nevndur Petur í Puntabyrgi fer til gravar úr Tvøroyrar kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya Sparikassa.

Lítla **Lív Wiegand Danielsen,** dóttir Guðrun Danielsen og Henrik Wiegand Hansen, andaðist í heiminum mikudagin 5. juli, 2 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju leygardagin kl. 13.

Urnan við **Erling Højgaard** fer úr Rituvíkar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Zacthilda Jensen** á Stykkinum andaðist týsdagin, 96 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju sunnudagin kl. 14.

**Hjørdis Djurhuus,** Tórshavn, andaðist mánadagin 3. juli á Landssjúkrahúsinum, 96 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni fríggjadagin kl. 14.





Brúsuveggir
Nú – 50%
90 cm silver, med 2 glas døre
Fyrr. 3998,-
Nú 1.999 ,-
90 cm silver, med buet glas front
Fyrr 4.498,-
Nú 2.249 ,-
90 cm silver, met pentaglide glas front
Fyrr 4.498,-
Nú 2.249 ,-

Gasbeton 40x60 cm
50 mm 48,-
75 mm 52,-
100 mm 60,-





Eik Plankagólv
Premium sortering
Mattlack
Fyrr 378,-/m2
Nú 298,-/m2
Spar 80,-/m2

Amboðskuffert við 127 Deilum
Wicent, tysk Góðska
Fyrr 2498,-
Nú 1798,-
Spar 600,-





Terassuvermari
Sort/stál
Til gas
Fyrr 1698,.
Nú 1298,-
Spar 400,-

damor
Á HJALLA · 188 HOYVÍK · TEL 315415
FAX 319001 · WWW.DAMOR.FO